## 50 móti 18.000

Stadion tók 18.040 áskoðarar og smáir 18.000 teirra vóru franskmenn. Restin – umleið 50 – taldi føroyingar. Tað munaði nevniliga øgiliga væl, at ein studentaskúlaflokkur úr Hoydølum var á námsferð á leiðini, og tískil eisini nýtti høvið at stuðla landsmonnum sínum. Hóast hesir føroyingar ikki munaðu nógv á Stade de Roudourou, so hava fleiri leikarar nevnt, at teir løgdu merki til føroysku fjeppararnar. Tískil fóru fleiri av leikarunum eisini yvir til føroyska flokkin eftir dystin, og takkaðu teimum fyri stuðulin við at klappa út til teirra.



## Massa á veg aftur

Brasilski Felipe Massa, sum í juli var partur av ógusligari vanlukku í Formel 1, er nú um at koma fyri seg aftur. – Fyrstu úrslitini eru positiv. Ikki minst kanningin av eygunum, sum vísir, at Massa hevur fingið fullu sjón sína aftur, skrivar Ferrari á heimasíðu sínari. Massa hevur hesa seinastu vikuna koyrt í einum simulator, og í dag skal fyri fyrstu ferð síðani vanlukkuna koyra í einum formel-1 bili.

## Frakland – Føroyar 5-0 (2-0):

# Klassar og kassar á m

**Munurin millum eitt lið, sum er mannað við leikarum úr Barcelona, Manchester United, Chelsea og Real Madrid og einum, sum bara hevur spælarar úr føroysku Vodafonedeildini, varð ruddiliga staðfestur leygarkvøldið. Frankaríki var bæði klassar og kassar betri enn Føroyar**



rolant@sosialurin.fo

Rólant Waag Dam



**Tréguier, Frankaríki:** Hvussu endar tað, tá eitt franskt landslið í hopla møtir einum føroyskum landsliðið, ið ikki rakar dagin? Svarið kom leygarkvøldið, tá franskmenn veruliga vístu hvør munurin millum heimstjørnur og føroysk bygdarfrell er.

Anelka í móti á Bø. Evra í móti Løkin. Henry í móti Davidsen. Benzema í móti Gregersen. Altjóða heimstjørnur í móti føroyskum heimføðingum.

18.000 franskmenn og 50 føroyingar á Stade de Roudourou. Øll odds vóru vend móti okkum, og tað var ikki uttan orsøk, varð staðfest.

### Trýstir í botn

Føroyska liðið slapp at byrja dystin, men tað gingu ikki nógv sekund, áðrenn franskmenn høvdu vunnið sær bóltin. Hendan høvdu teir eisini í rættiliga stóran mun næsta hálva annan tíman, har føroyska liðið var trýst so nógv sum sjáldan áður.

Fyrsta hálva tíman megnaðu vit tó at halda málið reint, men tað var ikki meiri enn tað sama. Tvær ferðir høvdu franskmenn rakt træverkið, umframt fleiri aðrar vandastøður eisini høvdu verið.

Talan var ikki um nakrar ávaringar, men bara um upphiting frá franskari síðu. Tí um føroyingar hildu, at teir høvdu riðið stormin av, tá ein triðingur av dystinum var spældur, og støðan framvegis var málleys og harvið jøvn, so vórðu hesir optimistiar spældir sundur og saman – skotnir niður.

### Alt avgjørt upp á fimm minuttir

34 minuttir vóru spældir og støðan verður 1-0. Málið er eitt kopi av einasta málinum, franskmenn skoraðu í Føroyum í august.

Bólturin verður fluttur inn úr borðinum, Gignac móttekur og sleppur at venda, tí Atli Gregersen ikki situr í kroppinum á honum. Maðurin snarar um seg sjálvan, smekkar til og Jákup Mikkelsen er prísgivin.

39. minuttir vóru spældir og støðan verður 2-0. Ein langur bólturin verður spældur niðan til Gignac, sum fer upp eftir hesum saman við Atla Danielsen.

Bólturin dettur niður, men hvørki Atli Danielsen ella Bogi Løkin megna